LANDSVERK
byggir land

# TÁ KRØV OG KARMAR STOYTA SAMAN

ÁRSFRÁGREIÐING 2009





## EIN STOVNUR AV SERFRØÐINGUM

SÍÐA 4-5



## BYGNINGSREGLUGERÐ VERÐUR SMÍÐAÐ

SÍÐA 10-11



## TRYGG FERÐSLA Í SUNDUM OG FIRÐUM

SÍÐA 6-7



Landsverk setir høg krøv til síni starvsfólk. Vit skulu vera framskygd og arbeiða málrættað, skulu til einhvørja tíð fáa sum mest nyttu burturúr tí, vit takast við, og skulu hugsa samskifti við borgaran í nærum øllum tí, vit gera. Landsverk kann við góðari samvitsku kalla seg ein virkisføran, opnan, óheftan og vitanartungan stovn, har fakligi førleikin er til reiðar at taka ímóti avbjóðingum í dag, í morgin og í komandi tíðum

# MILLUM FAKLIGAN KUNNLEIKA OG POLITISKAR AVGERÐIR



**OYVINDUR BRIMNES**
Stjóri, Landsverk

Árið, ið fór, var serliga merkt av fíggjarkreppum og árini frammanundan av yvirhitaðum búskapum kring stóran part av heiminum - eisini her heima.

Landsverk, sum nú hevur 62 ár á baki, hevur verið ígjøgnum baldrutar tíðir nakrar ferðir eftirhondini. Landsverk veit, hvat tað er at vera almennur stovnur í góðum tíðum, sum vit hava lagt aftur um okkum, tá ið útboðið av arbeiðsmegi er lítið, tá ið kostnaðarstøðið eksploderar, og tá ið tað almenna meir ella minni hvørvur í øllum "glamourunum". Landsverk veit eisini, hvat tað vil siga at vera til í fíggjarkreppum ella niðurgangstíðum, tá ið krubban er tóm, virksemið steðgar upp, hvør króna skal vendast og sparingar skulu finnast.

Tíbetur hevur Landsverk longu fyri árum síðani lagt seg eftir altíð at hava fingurin á pulsinum, soleiðis at stovnurin kann vera nøkur stig frammanfyri, tá ið eitt nú niðurgangstíðir og krøv uttanífrá knappliga seta dagsskránna.

## TÆNASTA TIL FÓLKIÐ

Landsverk var millum fyrstu fyritøkur í landinum, sum gjørdu sær eina visjónsætlan. Endamálið við hesum strategiska arbeiði er, at stovnurin støðugt mennist, soleiðis at tænastan til borgaran betrast áhaldandi. Alt, sum verður gjørt, skal hava eitt miðvíst yvirorðnað endamál. Broytingar ella menningarprosjektir verða ikki sett í verk á Landsverki av tilvild, men fyri at røkka hesi somu yvirorðnaðu visjón. Og visjónin er ikki bara eitt ullint og abstrakt hugtak fyri tey sveimandi, men nakað øll starvsfólk á Landsverki kenna og skulu arbeiða eftir. Høvuðsendamálið hjá stovninum við visjónsarbeiðinum er, at maksimal nytta fæst burtur úr tí tilfeingi, sum stovnurin hevur, soleiðis at tænastan til borgaran verður best møgulig.

## FRÍ KAPPING UM ÍLØGUR

Sammett við stovnin fyrr, er Landsverk í dag ein stovnur, sum bjóðar allar størri íløgur út í fría kapping í privatu vinnuni. Hetta er eitt gott dømi um eina broyting, sum er komin so líðandi innanífrá, men sum politiski myndugleikin nú í niðurgangstíðum setir sum krav.

Fyrimunurin og høvuðsendamálið hjá Landsverki við at bjóða út er, at tú tá til einhvørja tíð fær tað mest optimala úrslitið, t.e., aftur her, mest fyri pengarnar. Ein minni partur av uppgávum verður tó varðveittur á Landsverki fyri at tryggja eina ávísa serfrøði innanhýsis, men er talan bert um smærri ráðgevara- og entreprenøruppgávur.

Tað eru tó ikki bara fyrimunir við hesi tilgongd. Ein tann størsti trupulleikin er, at marknaðurin í Føroyum er so lítil. Vandin fyri privatmonopolum, duopolum ella manglandi kapping er tískil serstakliga stórur í Føroyum. Hetta hevur við sær hægri prís fyri somu veitingar, og dømir eru um, at tað almenna hevur goldið umleið 40% ov nógv fyri eina verkætlan. Ein annar trupulleiki í einum lítlum landi er, at játtanirnar eru so lágar og óstøðugar yvir ár. Skal alt bjóðast út, bæði stórt og smátt, kann tað hava við sær, at meginparturin av játtanini verður brúktur til útbjóðingartilfar. Einasta rætta er at hugsa loysnir til tær fortreytir og tann veruleika, tú er í, og ikki í blindum nýta sama leist sum í øðrum londum, har heilt aðrar dimensjónir og fortreytir gera seg galdandi. Ismur og politikkur mugu ongantíð blíva ein trúðarspurningur. Politiski myndugleikin eigur heldur at skapa brúkiligar karmar, sum arbeitt verður innanfyri við viti og skili.

## TÁ IÐ FAKLEIKIN MØTIR POLITISKUM ÁHUGAMÁLUM

Landsverk sær tað sum sína skyldu at veita teimum, sum taka avgerðir og Føroya fólki, fakliga væl undirbygdar og óheftar frágreiðingar og tilmælir um viðkomandi mál fyri at tryggja, at grundarlagið fyri at finna bestu loysnirnar í einstøkum málum er í lagi. Hetta er ikki altíð væl móttikið, tí ofta gera so nógv onnur áhugamál seg galdandi, enn tað at finna bestu loysnina, og ofta enda hesar fakligu tilráðingar tí í politisku skuffuni. Sum dømi kann nevnast ein røð av tilráðingum um verkætlanir innan infrakervið, har onnur viðurskifti enn tey reint fakligu hava verið avgerandi. Eitt mynstur hevur verið, at politiskt ynskiligar loysnir verða valdar, og síðani verður veruleikin tillagaður hesum ynskjum. Umráðandi fyri Landsverk er, at vit sum fakligur stovnur eru heilt óheft, og at loysnirnar ikki verða valdar, áðrenn kanningar og útgreiningar eru gjørdar. Hetta fyri at tryggja, at óviðkomandi viðurskifti ikki fáa ávirkan á valdu loysnina, í øllum førum ikki uttan so, at júst hesi viðurskifti er grundgevingin.

Fakligu tilráðingarnar í sambandi við játtan til rakstur og viðlíkahald av vegum eru tíverri ikki tiknar til eftirtektar, og hevur Landsverk tí hesi árini rationaliserað og effektiviserað, har tað yvirhøvur ber til, men má stovnurin nú ásanna, at mark er fyri, hvussu effektivur tú kanst blíva. Mark er fyri, hvussu lág játtan er fakliga ráðilig. Nakað tað sama er galdandi fyri almennu bygningarnar, sum eisini eru í vánaligum standi, orsakað av ov lágari víðlíkahaldsjáttan. Hóast lækkandi játtan, hevur Landsverk betrað um beinleiðis tænastuna til borgaran millum annað innan kavarudding, kunning og veðurtænastu. Hetta hevur eydnast við nútímans tøkni og starvsfólkum við røttu førleikunum og rætta hugburðinum.

Hendan ársfrágreiðingin, tygum sita við í hondini, lýsir ein part av teimum mongu økjum, sum Landsverk við sínum strategiska arbeiði hevur arbeitt miðvíst við at effektivisera, menna og nútímansgera seinnu árini við tí fyri eyga at fáa maksimala nyttu burturúr tí fíggjarkarmi, Landsverk umsitur.

## STRATEGISKA GRUNDARLAGIÐ

**MISSIÓNIN:** Staðfestir ítøkiliga endamálið við stovninum - tilverugrundarlagið

**VISJÓNIN:** Staðfestir leiðina, stovnurin skal ganga – leiðistjørnan

**KJARNUVIRÐINI:** Grundarlag fyri atburði og áskoðan, ið sjónliggera tað, ið verður virðismett og kravt av starvsfólkunum

## RITSTJÓRN



**SÚSANNA MC. BIRNIE**
samskiftisráðgevi



**KÁRI MIKKELSEN**
samskiftisráðgevi

## KELDUR



**ARMGARÐ STEINHÓLM,**
leiðari,ferðsludepilin



**RÓALDUR JÁKUPSSON,**
fíggjarfrøðingur, fíggjardeildin



**KLÆMINT ØSTERØ,**
verkfrøðingur, havnadeildin



**UNA D. CHRISTIANSEN,**
HR-mennari, starvsfólkadeildin



**BIRITA WARDUM,**
arkitektur, bygningadeildin



**KRISTIAN RASMUSSEN,**
leiðari, verkleiðsludeildin



**TORKIL OLSEN,**
leiðari, framleiðsludeildin

**Landsverk 2010**
Útgevari: Landsverk
Myndir: Bárður Eklund, Kristfríð Tyril og Landsverk
Sniðgeving, uppseting og prentumsiting: Sansir
Rættlestur: Levi Hentze

# EIN STOVNUR AV SERFRØÐINGUM



**ZACHARIAS THOMASEN,** vektpassari, framleiðsludeildin

**BÁRÐUR Í BAIANSTOVU,** arkitektur, bygningadeildin

**GUNNLAUGUR SIGHVATSSON,** teknikari, havnadeildin

**ANNE MARIE NORBY,** uppmátari, havnadeildin

**EYDNA S. MIKKELSEN,** verkfrøðingur, framleiðsludeildin

**DÁNJAL BJARKHAMAR,** skrivstovufólk, vegadeildin

**RENE THOMSEN,** maskinførari, vegadeildin

**ÁRNI JACOBSEN,** økisleiðari, vegadeildin

**BENT TOMMY LINKLETT,** verkfrøðingur, verkleiðsludeildin

FAKTABOKS

**Breiður starvsfólkahópur**

Hópurin av starvsfólkum á Landsverki er sera breiður og fevnir um arbeiðsmenn, maskinførarar, maskinmeistarar, arkitektar, verkfrøðingar, verkpassarar, landmátarar, skipsførarar, fulltrúar, skrivstovufólk, teknikarar, elektrikarar, smiðir og aðrar handverkarar, byggifrøðingar, bókhaldarar, búskaparfrøðingar, samskiftisráðgevarar og kt-fólk.

Landsverk er ein breiður og vitanartungur stovnur við starvsfólkum, ið á hvør sín hátt hava stóra servitan. Ymiskleikin í útbúgving og praktiskum royndum borgar fyri, at góðska er í teimum tænastum, sum stovnurin veitir

Tøkniligar broytingar á nærum øllum økjum í samfelagnum og herd krøv til góðsku hava havt við sær, at stórar broytingar eru farnar fram á flestu arbeiðsplássum, bæði í framleiðslu og arbeiðshátti. Ikki minst hjá einum stovni sum Landsverki. Hesar broytingar seta alsamt størri krøv til starvsfólkamenning.

Frá í stóran mun at hava tikið sær av framleiðslu, hevur Landsverk broytt seg til ein stovn av serfrøðingum. Hendan gongdin sæst eina best aftur á starvsfólkatalinum, ið seinastu 20 árini er minkað úr 500 niður í 160, svarandi til heili 68 prosent. Hóast Landsverk framvegis varðar av framleiðsluuppgávum, er ein av orsøkunum til stóra niðurskurðin, at Landsverk bjóðar flestu íløgurnar út, og í nógv størri mun virkar sum umsitingarligur serfrøðingastovnur, eftirlitsmyndugleiki og byggiharri.

Stóru broytingarnar hava havt við sær, at stovnurin ongantíð fyrr hevur havt eitt starvsfólkalið við so stórum ymiskleika. Broytingarnar seta sjálvandi nýggj krøv til starvsfólkadeildina, ið áður mest tók sær av umsitingarligum uppgávum.

Fyri at tryggja, at stovnurin er gearaður til broyttu umstøðurnar, fór leiðslan fyri nøkrum árum síðani at leggja munandi størri dent á menning av starvsfólkunum. Hetta fyri at tryggja betri samsvar millum yvirskipaðu strategiina – ella ætlanina – hjá Landsverki, førleikarnar hjá hvørjum einstøkum starvsfólki og innihaldinum í starvinum.

Eitt stig á leiðini var at endurskoða mannagongdirnar fyri starvsetanir. Størri dentur verður nú lagdur á at gera neyvari metingar av, um persónligu eginleikarnir hjá tí einstaka umsøkjaranum samsvara við tey krøv, ið starvið setir. Ein liður í hesum er at brúka sonevndu Garudatestina í sambandi við starvssetanir.

- Hetta er eitt samrøðuamboð, ið er ment í Danmark, og verður nýtt í nógvum londum til at lýsa persónligu eginleikarnar hjá umsøkjarunum. Til dømis, hvussu samstarvsevnini eru, og hvussu viðkomandi leggur sítt arbeiði til rættis, sigur Elsa Johanna Høgenni, starvsfólkaleiðari á Landsverki.

## MENNINGARSAMRØÐUR

Skal tað eydnast okkum at varðveita starvsfólk, er neyðugt áhaldandi at bjóða teimum møguleika fyri persónligari og fakligari menning. Ein liður í hesi ætlan eru tær eftirhondini væl kendu starvsfólkasamrøðurnar, ella menningarsamrøður, sum tær nú verða nevndar.

Í 2009 fór Landsverk undir at nýta ein nýggjan leist til árligu menningarsamrøðuna hjá starvsfólkum, ið eru knýtt at høvuðsskrivstovuni. Landsverk leggur nú størri dent á, at samrøðan er fríari og minni bundin at ávísum spurningum.

Í heyst verður aftur farið undir eitt nýtt umfar av menningarsamrøðum, og tá við eini nýggjari kt-skipan til starvsfólkaumsiting. Nýggja skipanin kann millum annað brúkast til menningarsamrøður og menningarætlanir. Hon fer at at lætta um umsitingina av hesum og at gera uppfylgingar av menningarátøkum.

Starvsfólk, ið ikki eru knýtt at høvuðsskrivstovuni, hava ikki áður luttikið í menningarsamrøðum. Ein liður í hesum er at fyrireika økis- og arbeiðsformenn til at fara undir samrøður við síni starvsfólk.

## LEIÐSLUÚTBÚGVING FYRI MILLUMLEIÐARAR OG FORMENN

Í januar 2010 fór Landsverk undir miðvísa førleikamenning av øllum formonnum og millumleiðarum. Endamálið er at tryggja, at øll starvsfólk við leiðsluábyrgd eru brynjaði til dagligar leiðsluuppgávur. Hetta fyri at tryggja, at samsvar er millum førleikarnar hjá einum leiðara ella formanni og starvsinnihaldið hjá starvsfólkunum.

Í vetur byrjaði ein leiðsluútbúgving, sum er samansett av eini røð av skeiðum fyri formonnum og millumleiðarum. Innihaldið í skeiðunum er sera fjølbroytt, men snýr seg í høvuðsheitum um at menna hesi starvsfólk í leiðsluleiklutinum og at gera tey meira tilvitaði um leiðsluleiklutin. Meira ítøkiliga merkir hetta, at evnir sum eggjan, loyalitetshugburður, samskifti, konfliktloysn, tilrættislegging og onnur viðurskifti verða viðgjørd. Fyri at rótfesta hesa vitan kring allan stovnin, hevur starvsfólkadeildin í stóran mun valt at nýta innanhýsis undirvísarar. Í ávísan mun hava eisini serkøn fólk uttannífrá undirvíst.

## STARVSFÓLKAPOLITIKKUR ENDURSKOÐAST

Fyri at kunnu røkja uppgávurnar á einum serfrøðingastovni, er ofta neyðugt við starvsfólkum, ið hava drúgvar royndir innan egin starvsøki. Tí er umráðandi, at starvsfólkini trívast og verða verandi. Seinni í ár verður tískil  farið undir at seta í verk ein eldrapolitikk við tí endamáli at eggja eldru starvsfólkunum til at leggja sær seinastu árini á arbeiðsmarknaðinum til rættis. Hetta fyri at hjálpa teimum at fáa eina glíðandi yvirgongd frá arbeiðslívinum til pensjónstilveruna, og fyri í góðari tíð at seta í gongd vitanardeilingina til tey yngru, sum skulu taka yvir.

Aðrir partar av nýggja starvsfólkapolitikkinum eru eisini ávegis. Til dømis er Landsverk í gongd við at orða ein krepputilbúgvingarpolitikk í sambandi við arbeiðsvanlukkur, álvarsligar vanlukkur og persónligar kreppur.

Sum heild kann sigast, at umframt hesi nýggju tiltøkini á starvsfólkaøkinum, er stovnurin í einari broytingartilgongd, har hátturin at arbeiða við starvsfólkaviðurskiftum spælir ein týðandi leiklut. Hetta skiftið er ein áhaldandi og long tilgond, ið fer at halda fram komandi árini.

# SØGULIGA LÁG JÁTTAN

Sum ein avleiðing av stóru samfelagskreppuni fyrst í nítiárunum, gjørdist játtanin til rakstur og viðlíkahald av samferðslukervinum á landi søguliga lág árini aftaná. Sæð í mun til príshækkingar og økt slit er játtanin seinastu 14 árini minkað við einum helmingi

Pástandurin um, at tað almenna alsamt bólgnar meir og meir, stendur í stórari andsøgn til játtanina til viðlíkahald og rakstur av øllum samferðslukervinum á landi. Tøl hjá Landsverki vísa, at síðani 1996, tá játtanin var søguliga lág, er tilsvarandi játtan í dag skerd við meira enn einum helmingi.

Tølini vísa eina heilt tíðiliga gongd. Samstundis sum keypiorkan er minkað við góðum 40 prosentum, síðani lágu játtanina miðskeiðis í nítiárunum, hevur vaksandi ferðslan økt munandi um slitið av vegakervinum. Sostatt er játtanin til rakstur og viðlíkahald bert helmingurin av tí, hon var fyri 14 árum síðani, tá hon sum áður nevnt, var søguliga lág.

Í 1996 var samlaða játtanin til samferðslukervið 60,9 mió. krónur. Við príshækkingum hesi árini hevði hetta talið svarað til 85,6 mió. krónur í 2009-tølum. Veruliga talið er 50,5 mió. krónur, ella stívar 10 mió. krónur lægri enn í 1996. Um økt slit orsakað av vaksandi ferðslu verður roknað uppí, hevði 1996-játtanin í 2009- tølum verið komin upp á 103,6 mió. krónur. Sostatt er hetta ein minking upp á 53,1 mió. krónur svarandi til heili 51 prosent.

Samlaða rakstrarjáttanin til Landsverk, ið umframt samferðslukervið á landi, eisini fevnir um rakstur og viðlíkahald av havnum, bygningum og tyrlupallum og umsiting av stovninum, er somuleiðis nógv skerd. Í 1996 var samlaða játtanin 75 mió. krónur, og í 2009 var hon 68 mió. krónur. Ein minking í krónutølum upp á 7 mió. Tá hædd verður tikið fyri prísvøkstri og øðrum, hevði 1996-játtanin í 2009-tølum verið komin upp á 107 mió. krónur. Í prosentum er sostatt talan um eina lækking av samlaðu játtanini upp á 35 prosent.

Við lágu játtanini slepst ikki undan, at hetta kemur at ávirka støðuna á til dømis vegakervinum. Við vanligum sliti heldur asfalt í umleið 15 ár, men við verandi játtan fara at ganga minst 30 ár, og helst longri tíð, ímillum hvørja asfaltering.

**FAKTABOKS**

### Átti at verið tvífaldað

Sum hendan myndin vísir, átti játtanin til viðlíkahald til vegakervið at verið meira enn tvífalt tí, hon er í løtuni. Í mun til 1996, tá játtanin var søguliga lág, er hon nú bert 48 prosent av teirri játtanini. Við at hyggja upp á samlaðu rakstrarjáttanina er myndin júst tann sama, sum víst omanfyri.




**FAKTABOKS**

### Støðug minking í mun til aðrar játtanir

Hendan myndini vísir játtanargongdina til hald av landsvegum í mun rakstrarútreiðslurnar á fíggjarlógini árini 1996 til 2009. Meðan játtanin til haldið av landsvegum hevur verið støðugt minkandi, hava útreiðslurnar til raksturin á fíggjarlógini verið støðugt vaksandi.




**FAKTABOKS**

### Íløgujáttan sveiggjar nógv

Verður hugt eftiri íløgujáttanini, so er hon ógvuliga ymisk frá ári til árs. Fyri 2009 var býtið av játtanini soleiðis:

| | (í mió. kr.) |
|---|---|
| Landsvegahald, havnir og annar rakstur | 68,4 |
| Nýggir landsvegir | 64,8 |
| Skúlar, sjúkrahús og aðrar útbyggingar | 87,8 |
| Umvæling og orkunýtsla í alm. bygningum | 31,4 |
| Aðrar játtanir | 2.2 |
| **Til samans** | **254,6** |






# TRYGG FERÐSLA Í SUNDUM OG FIRÐUM

Landsverk hevur eftirlit við 61 vitum kring landið. Eftirlitið fevnir um skipað sýn av lanternum, fýrvinklum, vitahúsum og streymveiting. Eisini hetta málsøkið hevur verið í visjónskvørnini á Landsverki, og er úrslitið einki minni enn eitt frambrot



Líka síðan 1948, tá ið Landsverk varð stovnað, hevur stovnurin vegna danska Farvandsvæsenet umsitið málsøkið "Vitar, merking og siglingarleiðir" í Føroyum, og er uppgávan fyrst og fremst at tryggja fría og trygga sigling innanoyggja í sundum og firðum í Føroyum. Ábyrgdarøkið fevnir um bæði eftirlit, viðlíkahald, at syrgja fyri at ljósviðurskiftini í vitalinjum eru í lagi og í samstarvi við danska Farvandsvæsenet at ráðgeva bæði landi og kommunum. Harafturat eigur og leigar Landsverk út ljósboyur til fyribils avmerking, tá ið nýbyggingar ella umvælingar fara fram í føroyskum havnum og sjóøki.

## EFTIRLIT OG VIÐLÍKAHALD AV VITUM

Saman við vitaansaranum, sum í flestum førum er havnarmeistarin, er vitaeftirlitið hjá Landsverki skipað soleiðis, at allir vitar verða sýnaðir í minsta lagi eina ferð um árið. Vitaansarin hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum og viðlíkahaldinum, so sum at skifta út perur, reingerð av linsum, avfukting og máling, meðan Landsverk syrgir fyri, at vitarnir lýsa samsvarandi vitalistunum og altjóða reglum. Størri umvælingar og broytingar av vitum verða altíð gjørdar í samstarvi við Landsverk.

## VITIN BOÐAR NÚ FRÁ BREKI

Ljósmerkingin í Sundalagnum, sum Landsverk eigur og rekur, var í 2005 í eitt longri tíðarskeið plágað av brekum, sum hevði við sær, at vitar og lanternur á farðleiðini lýstu óstøðugt.

- Støðan var ótolandi fyri sjóvegis ferðsluna, og var tískil avrátt at fyrireika eina útskifting av fleiri vitum og lanternum á farleiðini í Sundalagnum, sigur Klæmint Østerø, verkfrøðingur á havnadeildini á Landsverki.

Landsverk staðfesti eisini, at fráboðanarskipanin var ikki nøktandi, tí dagar kundu ganga ímillum, frá at ein viti var slóknaður til rætti viðkomandi á Landsverki fekk fráboðanina um brekið á vitanum.

Upplagt var at taka hesa uppgávu við í strategiarbeiðið á Landsverki, og skjótt var ein tørvslýsing snikkað saman, nøkur mál stungin út í kortið og ein útgreinað virkisætlan gjørd fyri nýggju vitarnar. Yvirskipaða málið var, at vitar og siglingarljós, sum Landsverk varðar av, skulu vera álítandi og altíð lýsa, sum tey eiga. Um brek eru, skal Landsverk boðast frá beinanvegin.

Við hesum stevnumiði í skjáttuni var ætlanin sjósett. Í samstarvi við ein veitara í Danmark hevur Landsverk ment eina sjálvvirkandi vaktarskipan, sum nú boðar frá umvegis heimasíðu, teldupost og sms, í somu løtu, sum brek er á vitanum. Henda skipan er einki minni enn eitt frambrot innan hetta økið og hevur virkað so mikið væl, at aðrir vitar nú kunnu knýtast í somu skipan. Fyri at spara bæði tíð og orku umframt at lætta um arbeiðsgongdina, hevur Landsverk eisini seinnu árini arbeitt miðvíst við at skifta út gamlar vitar og lanternur við nýggjar vitar við ljóskyknum. Í rakstri eru eyðsýndir fyrimunir við at nýta ljóskyknur, tí livitíðin er væl longri, samstundis sum el-nýtslan er munandi lægri.

## NÝGGIR VITAR

Skulu nýggir vitar setast upp og/ella fýrvinklar og ljósstyrki broytast í onkrum vita, er tað fólk frá Landsverki, sum fyrireika málini og leggja tey fram fyri donskum myndugleikum. Tað er somuleiðis Landsverk, sum hevur ábyrdina av, at hesar broytingar verða framdar í verki og sum fyrisett.

Nógv arbeiði hevur verið av gomlu kommunalu vitunum, tí fleiri verkløg eru niðurslitin og skulu skjótt skiftast út. Aloftast elvir ein útskifting eisini til aðrar broytingar av vitanum. Tað kunnu verða ynskir um at økja um ljósstyrkina, ella ynskir um at broyta vinklarnar á vitanum fyri at leggja innsiglingina í tryggari legu.

Sum dømi kann nevnast, at Landsverk, eftir áheitan frá Miðvágs kommunu, hevur arbeitt við einum uppskoti um at bøta um innsiglingarviðurskiftini til Miðvágs havn og samstundis tryggja aliøkinum uttan fyri verjugarðin betri umstøður.

Allar broytingar av vitum og siglingarleiðum skulu gerast samsvarandi altjóða fyrisettum reglum (IALA) og skulu góðkennast av donskum myndugleikum.

Í hesum sambandi hevur Landsverk gjørt umfatandi kanningar av innsiglingarviðurskiftunum omanfyri og undir sjóvarmálanum. Dýbdarmátingar við fleirstráluekkoloddi vóru gjørdar av botninum í innsiglingarleiðini, og nýtt dýbdarkort var gjørt fyri innsiglingina í Miðvági.

Grundað á kanningarnar var eitt uppskot gjørt til nýggja innsiglingarleið, sum saman við nýggja dýbdarkortinum var sent donskum myndugleikum til góðkenningar.

Eftir ætlan skal ein nýggjur viti setast upp á innara verjugarðin, sum gongur út frá Prestlandinum í Miðvági. Nýggi vitin verður av sama merki og við somu eginleikum sum tann, sum stendur á brúnni um Streymin.

- Á Landsverki gjørdu vit eitt uppskot til tekniska loysn, og heintaðu inn tilboð uppá nýggja vitan. Nýggi vitin, ið verður settur upp ein av fyrstu døgunum, verður eisini bundin í sjálvvirkandi fráboðanarskipanina, sum stovnurin hevur ment, sigur Klæmint Østerø at enda.

Landsverk arbeiðir á henda hátt miðvíst við at menna føroysku vitarnir fyri at kunna veita sjóvegis ferðsluni í sundum og firðum eina trygga og fría siglingarleið.





# ÓSAMSVAR MILLUM JÁTTANIR OG TÍÐARKARM

Á hvørjum ári finnast upp til fleiri dømi um, at fyrsti partur av eini íløgujáttan kemur í óhóskandi støðd á fíggjarlógina. Undir politisku viðgerðini verður ov sjálvan tikið hædd fyri, at tað tekur langa tíð at fyrireika eina verkætlan. Tí er oftani lítil og ongin møguleiki fyri at koma í gongd við arbeiðið til ta tíðina, sum ynski er um.

Allar almennar íløgur krevja játtan á fíggjarlógini, men tað er ikki líka mikið, hvussu játtanin er skrúvað saman, og nær fyrsti partur av henni kemur á fíggjarlógina, og hvussu stórur hesin fyrsti parturin er.

Ein aftuvendandi trupulleiki, tá ið komið er út á árið, eru ónýttar íløgujáttanir. Hetta er ikki tilvildarligt. Orsøkin er í flestu førum, at lítil ella ongin tíð hevur verið til at fyrireika verkætlanina, ið oftani er sprottin úr einum politiskum ynski. Oftani verður ein stór upphædd játtað til heilt ófyrirekaðar verkætlanir. Av tí sama leggur hetta stórt – beinleiðis ella óbeinleiðis – trýst á fyri at fáa ætlanina í gongd, hóast hon als ikki er klár at fara undir. Hetta sæst millum annað við, at ongin verklagslóg er gjørd, áðrenn arbeiðið byrjar. Sostatt kann vera torført at fáa rættan samanhang í fyrireikingarnar til verkætlanina, tí tíðarkarmurin ikki er nóg rúmur. Ein annar trupulleiki er, at játtanir til verkætlanir, sum vara yvir fleiri ár, ikki hava røttu støddina. Oftast eru játtanirnar ov lágar, tá ið arbeiðið er byrjað, og neyðugt er at stegða á, tá ein partur er gjørdur. Síðani má byrjast aftur, eftir at nýggj játtan er fingin til vega.

Við neyvari planlegging av játtanargongdini hevði bert verið neyðugt at fyrireika verkætlanina eina ferð, og tá slepst undan at rigga av og til aftur.

Verkætlanir, har verklagslóg ikki er gjørd, men sum ganga yvir fleiri ár, hava oftani tann trupulleika, at ikki øll viðurskifti eru fingin upp á pláss, áðrenn sjálvt arbeiðið fer í gongd. Sum minstamark skal nakað av prosjekteringsarbeiði, útbjóðing og sáttmálasamráðingar gerast, umframt at tað hvørja ferð er neyðugt at rigga til og av aftur, um játtanin er ov lág.

Ein slíkur framferðarháttur er kostnaðarmikil og leingir verkætlanina nógv. Eisini er hetta við til at lækka virðið av játtanini, tí lutfalsliga stórur partur fer til annað enn sjálva byggiuppgávuna, umframt at nyttan kemur ov seint.

Sum avvarðandi stovnur av almennum byggiverkætlanum undir landinum, er tað umráðandi fyri Landsverk at vísa á, hvussu týdningarmikið tað er at seta rættan tíðarkarm og røttu støðd av játtan á hvørja einstaka verkætlan. Hetta fyri at tryggja, at arbeiðið fer fram á nøktandi hátt. Tí er tað frá politiskari síðu neyðugt at seta realistisk mál fyri, hvussu stórur skundur verður settur á at fáa eina almenna verkætlan í gongd. Og tá hon er komin í gongd at hava eina hóskandi játtan.

FAKTABOKS

## Dømir um neyðug fyrireikingararbeiði

Sum dømi um neyðugar fyrireikingar í sambandi við verkætlanir kann nevnast, at í sambandi við tunlar skulu gerast ymsar jarðfrøðiligar kanningar. Til dømis við boringum at staðfesta, hvussu tilfarið í fjallinum er háttað. Hetta kann eisini koma upp á tal í sambandi við vegagerðir. Tá havnir skulu gerast ella útbyggjast, er neyðugt við streym-, aldu-, vind- og dýpdarkanningum. Í sambandi við samferðsluverkætlanir skal ein møguligur tørvur staðfestast við ferðslukanningum. Eisini kunnu kostnyttu-kanningar koma upp á tal í sambandi við allar størri verkætlanir. At fáa loyst fíggingarspurningin er altíð ein stórur spurningur. Tað kann eisini taka fitt av tíð at greiða spurningin um lendið við avvarðandi ognarar. Ber ikki til at koma til sættis um keyp, má avgerð takast um ognartøku. Hetta kann seinka tilgongdini upp í einar átta mánaðir. Áðrenn byggingin kemur rættiliga í gongd, verður ein bygginevnd sett, sum neyvt skal staðfesta tørvin, og saman við Landsverki og møguligum uttanhýsis ráðgevum finna útav, hvør tørvurin er, hvørji krøv skulu setast til byggingina, og á hvørjum støði, góðskan skal verða. Útgreiningin um hetta fyrireikandi arbeiðið verður feld niður í eina frágreiðing, ið nevnist byggiskrá, sum í stórum lýsir sjálva verkætlanina. Síðani kann prosjekteringin fara í gongd. Av øðrum viðurskiftum, sum kann taka drúgva tíð, kunnu nevnast loyvir frá friðingarmyndugleikum, byggimyndugleikum o.a.

FAKTABOKS

## Tíðin stóra ávirkan á byggikostnaðin

Kostnaðurin fyri eini verkætlan kann sveiggja nógv, alt eftir um bygt verður í góðum ella minni góðum tíðum. Taka vit Marknagilsdepilin, so er fyribils metingin 21.000 - 23.000 krónur fyri fermeturin. Í Klaksvík var fermetraprísurin av útbyggingini av Tekniska Skúla niðri á umleið 18.000 krónum. Taka vit so Miðnámsskúlan í Hovi, sum er bygdur, meðan stór ferð var á búskapinum, lá fermetraprísurin upp ímóti 30.000 krónum. Í tí verkætlanini gjørdi tað seg harafturat galdandi, at áhugin fyri hesi byggiuppgávu var nærum ongin. Ein tummilfingraregla í sambandi við eina størri byggiætlan er, at grundøkið, trygging, prosjektering og ráðgeving annars, byggileiðsla, fakligt eftirlit og ymiskt annað fara við umleið 20 prosentum av kostnaðinum, meðan hini 80 prosentini fara til sjálva byggingina, t.e. til tilfar og handverkarar. Harumframt kann ognartøka tíðum vera ein luftalsliga stórur fíggjarpostur, umframt at jørðin er dýrkað nógv seinnu árini.

FAKTABOKS

## Einføld verkætlan krevur minst átta mánaðir

Tá alt gongur eftir vild við eini nýggjari verkætlan, tekur tað tó minst 8 mánaðir, áðrenn farast kann í gongd við sjálvt arbeiðið. Treytin fyri, at tað gongst so mikið væl við hesi verkætlan, er, at tey fyrstu punktini av planleggingini eru fingin frá hondini, og at ikki er neyðugt við forkanningum og uppmátingum. Hendan gongdin sær tá soleiðis út:

- Planlegging
- Forkanningar
- Uppmátingar
- Byggiskrá
- Forprosjekt
- Ognarviðurskifti
- Kommunali myndugleikin
- Friðingarmyndugleikin (hesi bæði síðstu koyra samstundis við ognarviðurskifti)
- Aðrir myndugleikar (samstundis ella ikki neyðugt)
- Høvuðsprosjekt (samstundis við friðingarmyndugleikar)
- Útbjóðing og sáttmálasamráðingar
- **Tilsamans 8 mánaðir**

Ógvuliga sjálvdan gongur so væl sum í hesum dømi. Talan er um eina einfalda uppgávu, har ráðgevarar og myndugleikar eru klárir at fara til verka beinanvegin og gera alt liðugt, so skjótt sum til ber, og at ikki er neyðugt við ognartøku. Tað mest vanliga er, at tað gongur meira enn eitt ár ella upp í fleiri ár, áðrenn arbeiðið kann byrja. Tí kann vera nyttuleyst at krevja eina verkætlan setta í gongd sama ár, sum játtanin er sett á fíggjarlógina fyrstu ferð.

# BYGNINGSREGLUGERÐ Á VEG

Reglur og krøv til nýbygging, umbygging og umvæling av bygningum hevur verið ein mangulvøra innan føroyska bygging. Farið var undir at loysa henda trupulleika í 2009, tá arbeiðið við bygningsreglugerð byrjaði. Nú er komið væl áleiðis, og reglugerðin verður væntandi liðug í ár



Krøv til orkunýtslu, inniluft, tilfar, brunatrygd og atkomuviðurskifti eru bara nøkur av teimum viðurskiftum, sum ein nýggj bygningsreglugerð fyri Føroyar fer at áseta nærri reglur fyri. Arbeiðið við reglugerðini og lógarsmíðið til hesa er nú komið so mikið langt, at hetta verður liðugt til heystar í 2010.

Fleiri ferðir hevur verið roynt at seta hol á arbeiðið at orða eina føroyska bygningsreglugerð, og nógvar bygningsreglugerðir hava verið ávegis síðani 1976, men av ymsum orsøkum er arbeiðið altíð steðgað upp. Tí halda bæði Innlendismálaráðið og Landsverk tað vera sera umráðandi at koma á mál hesaferð, og hetta sær út til at fara at eydnast.

- Fyri at fáa reglugerðina at virka skjótast gjørligt, verður arbeitt stigvíst, soleiðis at einstakir partar í samlaðu reglugerðini verða settir í gildi so við og við, sigur Ewald Kjølbro, leiðari á bygningadeildini á Landsverki.

Fyrsti parturin, sum verður settur í gildi, inniheldur ásetingar fyri orkunýtslu í bygningum. Hesar reglur eru tó bert ein lítil partur av einum nógv meira umfatandi arbeiði, sum fevnir um ásetingar fyri føroyska bygging í breiðastu merking. Reglugerðin fevnir um átta partar, sum eru lýstir aðrastaðni her á síðunum.

Ein verkætlanarbólkur og ein stýrisbólkur eru settir at standa fyri arbeiðinum við bygningsreglugerðini. Í verkætlanarbólkinum eru umboð fyri ymsar myndugleikar og áhugabólkar, sum varða av økinum. Verkætlanarleiðari fyri uppgávuni er Birita Wardum, arkitektur á Landsverki.

Nýggja reglugerðin verður staðfest við eini løgingslóg um bygging, sum er um at verða klár at leggja fyri Løgtingið.

Bygningsreglugerðin fer at umfata alla bygging í Føroyum – bæði almenna og privata.

FAKTABOKS

## Bygningsreglugerðin í høvuðsheitum

Yvirskipað ásetir bygningsreglugerðin krøv og reglur fyri alla nýbygging og umvæling av bygningum

**ÁSETINGARNAR FEVNA UM:**

1. Fyrisitingarligar ásetingar - alt tað formliga, til dømis vegleiðing til reglur
2. Ásetingar fyri bygd øki - eitt nú mark, hæddir, og hvussu langt byggjast skal frá vegi
3. Innrætting av bygningum og atkomuviðurskifti - ásetir millum annað krøv um innrætting, hæddir, støddir og atkomuviðurskifti
4. Konstruktiónir - krøv til uppbygging av konstruktiónum
5. Brunaviðurskifti - krøv til brunatrygd
6. Inniumhvørvi - krøv til inniluft, luftskiftisútbúna, byggitilfar og annað
7. Innlegging - krøv til tekniskar innleggingar, eitt nú sanitet, el og oljufýr
8. Orkunýtsla - áseting av krøvum fyri orkunýtslu í bygningum viðvíkjandi bjálving, tættleika og byggitilfari

Komandi bygningsreglugerðin fer eisini at virka sum karmur fyri kommunalar byggisamtyktir

FAKTABOKS

## Einfaldari reglur

Síðani 1961 hava danir havt greiðar ásetingar fyri bygging, og teirra reglugerð er dagførd við jøvnum millumbilum. Enn ein nýggj útgáva av donsku reglunum, BR2010, kemur í gildi í 2010. Avgjørt er at brúka donsku reglugerðina sum leist fyri føroysku bygningsreglugerðina. Avgerðin er tikin út frá, at Danmark er rættiliga frammarlaga við at áseta orkukarmar. Føroyskir ráðgevar nýta longu í dag donsku reglugerðina sum vegleiðandi, tá ið hús og bygningar skulu byggjast. Reglugerðin verður tillagað fortreytirnar fyri bygging í Føroyum, sum í mongum førum víkir frá fortreytunum í Danmark. Eisini verður hugt eftir bygningsreglugerðum í øðrum grannalondum.

FAKTABOKS

## Orkusparandi átøk í 2009

Her eru nøkur dømi um bygningsumvæling og orkusparandi átøk í 2009: Á Klaksvíkar Sjúkrahús var íløga gjørd fyri umleið 3 mió. krónur í nýtt hitaverk, bjálving í takrúmi, nýggj vindeygu, ljósstýringar og annað. Væntaða sparingin fyri hitanýtslu er umleið 200.000 kilowatt-tímar, ið svara til 20.000 litrar av olju um árið. Í el-nýtsluni er væntaða sparingin 50.000 KW-tímar.

Í Útvarpshúsinum, sum hevur felags hitaskipan við Norðurlandahúsið, eru íløgur gjørdar í nýggjar ketlar, stýringar og í ein roykgassverkslara. Orkunýtslan í 2008 var umleið 96.000 litrar, og sparingin eftir hesi tiltøk verður mett til 15 prosent. Afturgjaldstíðin fyri ketlarnar og roykgassvekslaran var við galdandi oljuprísum í november 2009 mett til 5 ár.

Eisini eru aðrar umvælingar og orkusparandi tiltøk framd:

**Skansapakkhúsið og Salurin í Tinganesi**
Bjálving og umvæling

**Landssjúkrahúsið A-bygningurin**
Vindeygu skift

**Akstovan í Havn**
Nýggj vindeygu, hurðar, yvirljós, klædningur og tak í millumbygningi

**Røktarheimið á Suðuroyar Sjúkrahúsi**
Nýggir ketlar, orkumátarar fyri hitaskipan og streym

**Sjómansskúlin í Klaksvík**
Bjálving, stýring hitaverk, ventilatiónsskipan

Lærlingaheimið og Tekniski skúli í Klaksvík
Bygningsmvælingar, nýggir ketlar og oljufýringar, nýggjar pumpur, nýggj ventilatiónsskipan, stýringar á hitaverki og ventilatión

**Tekniski Skúli í Klaksvík**
Nýggjar termorútar, stýring hitaverk og annað

**Føroya Læraraskúli**
Seta upp orkumátarar



# SPARINGAR OG ØKT VIRKISFØRI

Skerjingar, orsakað av minkandi eftirspurningi og herd altjóða krøv til endurnýtslu, hava ávirkað virksemið hjá Landsverki seinnu árini. Samstundis hava broyttu tíðirnar sett ferð á at nútímansgera framleiðsluna av skervi og asfalti

Eins og aðrastaðni í samfelagnum var árið í fjør merkt av niðurgongd á tí øki, sum hevur við framleiðslu at gera. Minkandi eftirspurningurin eftir asfalti, gróti og skervi hevur borið í sær, at framleiðsludeildin á Landsverki nú hevur tillagað virksemið eftir broyttu umstøðunum.

Fyrr hevur stovnurin framleitt tilfar úr trimum grótbrotum. Tey liggja í Suðuroy, oman fyri Porkeri, í Hundsarabotni á Streymoynni og á Hústoft, oman fyri Lamba í Eysturoy.

Niðurgongdin í grótbrotinum í Porkeri kom til sjóndar í seinnu helvt av 2008, og tá sama gongd helt fram í 2009, tók stovnurin avgerð um at niðurlaga virksemið har. Somuleiðis er skorið niður á Hústoft, meðan virksemið í Hundsarabotni liggur á nøkulunda sama støði. Umframt grótknúsing, fer øll framleiðsla av asfalti fram í Hundsarabotni.

- Serliga er tað minkandi asfaltframleiðslan, sum hevur minkað um tørvin á gróti úr brotinum í Porkeri. Í 2008 tóku vit 70.000 tons norður, og hetta var eisini nóg mikið til alt árið 2009. Ein natúrlig avleiðing av hesum vóru skerjingar í starvsfólkatalinum, og tískil vóru fýra mans úr brotinum í Porkeri uppsagdir í februar í fjør, sigur Torkil Olsen, leiðari á fremleiðsludeildini á Landsverki.

Sum leið út á árið minkaði eftirspurningurin uppaftur meira. Við minkandi framleiðslu av asfalti og harvið minni nýtslu av suðuroyargróti, gjørdist úrslitið, at báðir teir síðstu menninir í grótbrotinum vórðu uppsagdir.

Síðani hevur tørvurin á tilfari verið so avmarkaður, at arbeiðið hevur verið klárað av eini tilkallivakt, sum er knýtt at brotinum. Eisini liggur nógv sprongt grót niðurfyri.

## HUNDSARABOTNUR OG HÚSTOFT ARBEIÐA SAMAN

Á Hústoft byrjaði árið 2009 væl við stórt sæð somu framleiðslunøgd, sum í 2008. Hetta vendi longu í mars, tá tað kom ein týðilig niðurgongd, ið helt fram út á summarið. Tí varð í juni avgerð tikin um at siga fimm fólkum úr starvi.

Í dag eru tveir mans knýttir at grótbrotinum á Hústoft. Meðan grótknúsing fer fram, traðka fólk úr Hundsarabotni ella aðrastaðni til fyri at koyra maskinur.

Seinnu árini hevur stórur dentur verið lagdur á at læra starvsfólk á Landsverki at handfara ýmiskar uppgávur. Hetta verður gjørt fyri at fáa størri fleksibilitet á arbeiðsliðið og harvið økja um virkisførið.

FAKTABOKS

### Økt virkisføri

Sum liður í rationaliseringum valdi Landsverk at seta upp nýggjar vektaskipanir í grótbrotunum á Hústoft og í Hundsarabotni. Skipanin virkar soleiðis, at bilurin fer á vektina á veg inn í brotið, sum skrásetir, hvussu nógv hann tá vigar. Á einum skermi skrásetir bilførarin nummarið á bilinum, slag av tilfari og hvør gjaldarin er. Á veg út aftur við lessinum fer bilurin aftur á vektina, har munurin á innvigan og útvigan verður staðfestur og skrásettur sum vektin á tilfarinum.

FAKTABOKS

### Einfaldari stýrisskipan

Asfaltverkið og skervverkið í Hundsarabotnin hava hvør sína stýrisskipan, ið hava staðið hvør í sínum høli. Hesar standa nú í sama høli. Fyrimunurin er, at nú eru tveir persónar knýttir at skipanunum sum operatørar, og báðir hava førleika at koyra báðar skipanirnar. Tað gevur møguleika fyri, at ein persónur kann seta bæði asfalt- og skervverkið upp, tá til dømis framleiðslan skal í gongd um náttina.

FAKTABOKS

### Endurnýtsla

Í grannalondunum er tað vorðið eitt krav at endurnýta asfalt. Talan er um avfresað asfalt í sambandi við endurasfaltering og avgrivið asfalt. Asfalt má hvørki tyrvast ella liggja ónýtt í jørðini, men takast upp og nýtast sum ískoytistilfar í asfaltframleiðsluni. Tó kann tað bert latast út í berandi asfaltlagið í sambandi við nýgerðir og ikki í slitlagnum, ið skal lúka nøkur heilt serlig krøv til styrki. Landsverk hevur valt eina loysn, sum loyvir upp í 15 prosent av ískoytistilfari í asfalt. Endurnýtslan krevur íløgur í eitt sokallað dosseringsanlegg og ein knúsara. Fyrsti partur av hesi útgerð verður klárur at taka í nýtslu á sumri í 2010. Endurnýtslan kemur sum frá líður at hava sparingar við sær. Parvís tí, at minni nøgd av skervi skal til asfaltframleiðsluna, og tí tað slepst undan at gjalda fyri at sleppa av við tilfarið á endurnýtslustaðið.



# FERÐSLUTRYGD ER FELAGS ÁBYRGD

Landsins myndugleikar tóku í 2007 avgerð um, at talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða skal lækka við einum triðingi innan ár 2015. Avgerðin er fyrst og fremst grundað á nullhugsjónina, sum sigur, at ongin skal doyggja ella fáa varandi mein í ferðsluni, sum eisini er samtykt í Løgtinginum

Á Landsverki verður fylgt heilt neyvt við ferðslutrupulleikum og -óhappum á teimum 500 km av landsvegi, sum stovnurin sum vegamyndugleiki varðar av. Landsverk ger eitt miðvíst arbeiðið fyri at bøta um ferðslutrygdina á vegunum, og verður játtanin til ferðslutrygdartiltøk fullnýtt á hvørjum ári. Eingin føst afturvendandi upphædd er oyramerkt í landsins fíggjarlógum næstu árini til hesa langtíðarætlan, og er tað tí av alstórum týdningi, at politiski myndugleikin á hvørjum ári pliktar seg til at raðfesta ferðslutrygdararbeiðið og til at seta av neyðugan pening til ábøtur, gransking, upplýsing og onnur tiltøk fyri at røkka hesum máli innan 2015.

Játtanin til ferðslutrygdartiltøk, sum í 2010 er skerd úr 7,5 mió. krónum niður í 3,0 mió. krónur, røkkur ikki til at bøta um øll viðurskifti í senn, tí hevur Landsverk raðfest soleiðis, at tiltøk verða sett í verk, har tú fyribyrgir flest ferðsluóhappum.

**Arbeitt verður við 3 ymiskum átøkum fyri at betra um ferðslutrygdina:**

· Verandi vegir verða tryggjaðir við ferðslutrygdareftirliti
· Nýggir, planlagdir vegir verða tryggjaðir við ferðslutrygdargrannskoðan
· Alt ferðslutrygdararbeiðið er grundað á hagtøl og kanningar

Høvuðsendamálið er at fáa eitt skipað og effektivt ferðslutrygdararbeiði, har dentur er lagdur á at fáa mest møguliga trygd fyri pengarnar.

- Fyri at fyribyrgja, at ferðsluóhapp henda, er umráðandi at kenna orsøkirnar til, hví tey henda. Eitt miðvíst arbeiði verður gjørt fyri at heinta inn neyvar upplýsingar, útgreiningar og tøl, sum vísa á, hvar og hví óhapp henda. Hugt verður eisini út um landoddarnar eftir kanningum og royndum aðrastaðni. Jú fleiri upplýsingar, vit hava um ferðsluna og ferðsluóhapp, tess betur kunnu vit seta inn á røttum staði og við hóskandi loysnum, sigur Armgarð Steinhólm, leiðari á ferðsludeplinum á Landsverki.

**FYRIGEVANDI OG LEIÐANDI VEGIR**

Sum aðrastaðni, er eisini her heima ov nógv ferð, at fólk ikki brúka trygdarbelti, rúsevni og óroyndir bilførarar atvold til flest øll ferðsluóhapp. Hinvegin vísa kanningar eisini, at vegurin sjálvur og kringumstøðurnar eru beinleiðis orsøk til 6% av øllum ferðsluóhappum og saman við menniskjasligum feilum óbeinleiðis orsøk til 19%. Tískil ber eisini til at fáa talið av ferðsluóhappum niður við at gera vegakervið tryggari.

Landsverk hevur í eitt longri tíðarskeið lagt dent á at fremja trygdartiltøk á verandi landsvegir. Ymisk trygdartiltøk eru gjørd á vegateinum og støðum kring landið, har tað í meðal henda flest ferðsluóhapp. Hildið verður áfram við hesum leisti við skipaðum ferðslutrygdareftirliti, har vegateinar verða gjøgnumgingnir við “ferðslutrygdarbrillum”. Alt, ið kann bøta um ferðslutrygdina, verður skrásett og tikið við í raðfestingina av ferðslutrygdartiltøkum.

-Soleiðis kunnu vit eisini á verandi vegum vera eitt stig frammanfyri og fyribyrgja, at ferðsluóhapp henda, sigur Armgarð Steinhólm.

Miðað verður harafturat ímóti at sniðgeva nýggjar vegir soleiðis, at óhapp ikki henda. Sjálvur vegbygnaðurin skal vísa og geva bilføraranum eina kenslu av, hvør atburður er hóskandi júst har, hann er. Tey, sum eru í ferðsluni, hava brúk fyri røttum upplýsingum til rætta tíð og á røttum staði fyri at kunna ferðast trygt.

- Um tey ferðandi fáa ov fáar ella óskiljandi upplýsingar, kann hetta í ringasta føri elva til ferðsluóhapp. Alt vegaumhvørvið eigur tí at vera leiðandi, skilt á tann hátt, at tað er einfalt, eintýtt og lætt at skilja hjá øllum, sum ferðast í tí, sigur Armgarð Steinhólm.

Hagtøl vísa, at menniskjasligir feilir eru orsøk til flest øll ferðsluóhapp, eisini hóast vegirnir verða sniðgivnir so ferðslutrygt og leiðandi, sum til ber. Tí skulu vegir og vegaumhvørvi eisini vera fyrigevandi. Hetta merkir, at henda ferðsluóhapp kortini, skal vegurin og vegaumhvørvið verða soleiðis háttað, at skaðin verður so lítil, sum til ber. Hetta verður m.a. gjørt við at taka burtur fastar lutir fram við vegnum, seta upp bilverju og sum heild tryggja vegin soleiðis, at um ein bilur fer útav, verður skaðin avmarkaður.

Samanumtikið gerst tó einki, um ikki hvør einstakur, t.e. bæði bilførari, politikkari og tey, sum varða av ferðslutrygdararbeiði í Føroyum, hvør í sínum lagi og í felag taka ábyrgd og arbeiða fyri ferðslutrygd í tí dagliga.

**FERÐSLUTRYGDARGRANNSKOÐAN:**

Sum fyribrygdi stavar ferðslutrygdargrannskoðan upprunaliga úr Onglandi. Endamálið við ferðslutrygdargrannskoðan er at betra valdar ferðsluloysnir, so færri fólk doyggja ella fáa skaða í ferðsluni av teirri grund, at vegurin ikki er nóg tryggur. Tað er ein óheftur ferðslugrannskoðari, sum hevur serliga útbúgving, sum metir um ferðslutrygdina í verkætlanum, áðrenn vegurin verður bygdur. Royndir vísa, at slík tiltøk minka um talið á deyðum og skaddum í ferðsluni við 5-8%, og loysa slík tiltøk seg eisini fíggjarliga. Ferðslutrygdargrannskoðan er nú eitt standard krav í sambandi við allar nýggjar vegaverkætlanir hjá Landsverki.






# FERÐSLUTRYGDARTILTØK HJÁ LANDSVERKI Í 2009



## RUMLIFOYRUR

Í 2009 vóru íalt kr. 500.000 settar av til rumlifoyrur. Rumlifoyrur vóru gjørdar á nýasfalteraða vegateinin frá Sandvíkarhjalla til Sunds, gjøgnum Kollafjarðartunnilin og heilt til rundkoyringina við Vágatunnilin. Rumlifoyrur vóru eisini gjørdar frá rundkoyringini við Norðskála og til Skálafjørð. Íalt vóru rumlifoyrur gjørdar á umleið 24 km av landsvegi í 2009.

Royndirnar við rumlifoyrum á vegmiðjaðaranum og við vegjaðaran á ferðslutungum teinum á landsvegum hava roynst sera væl. Endamálið við rumlifoyrum, sum verða fresaðar niður í asfaltið, er at geva bilførarum eina ávaring, um koyrt verður tvørtur um mið- ella síðustrikuna. Rumlufoyrurnar geva eitt ljóð í bilinum, tá tú koyrir á tær.

FERÐSLUTRYGDARTILTØK 2009







## DAGFØRING AV TUNLUM

Arbeiðið at dagføra tunlar við trygdarútgerð og tilbúgvingarætlanum heldur fram. Umframt at menna trygdar- og yvirvakingarskipanina til tunlarnar vóru Norðskálatunnilin og Leynatunnilin liðugt dagførdir við trygdarútgerð og tilbúgvingarætlan.

## MERKING

Tryggari gonguteigur er gjørdur við Mannbrekku á Hvítanesvegnum. Oyggjar eru gjørdar við gonguteigin, sum umframt at gera tað tryggari hjá fólki at fara yvir um vegin, eisini gera tað møguligt hjá fólki at steðga á vegmiðjuni.

Hámarksskeltir og skelti, ið vísir bygt økið, eru merkt niður á vegin við innkoyringina til Havnina.

## MIÐJAÐARI

Ein roynd er gjørd við miðjaðara á Kaldbaksvegnum, frá Mannbrekku til Sunds. Miðjaðarin á vegnum verður breiðkaður fyri at skilja ta nógvu ferðsluna meira sundur. Kalbaksvegurin er landsvegurin við mest ferðslu.

FERÐSLUTRYGDARTILTØK 2009







## VEGAMÓT

Vinstrasnaringarbreyt er gjørd í Streymnesi og ein nýggjur busslummi.

Í Hósvík er landsvegurin breiðkaður við vegamótið til bygdina, so at ferðslan, sum ikki skal inn í bygdina, sleppur ótarnað framvið – eitt ferðslutrygdartiltak, ið kann samanberast við tað, sum er gjørt við innkoyringina til Sandvíkarhjalla.

Á Kambsdali er ein vinstrasnaringarbreyt gjørd. Hetta er ein eyka vegbreyt til ferðsluna, ið skal snara til vinstru, soleiðis at ferðslan á høvuðsvegnum ikki verður tarnað av bilum, ið skulu til Kambsdalar.

## FERÐGÁAR

Í Hoyvík er eitt býarportur og ein ferðgái sett upp fyri at tilskila, at nú verður koyrt inn í bygt øki. Hetta er tann landsvegurin, har mest ferðsla er í bygdum øki.

Í Kollafirði er eitt býarportur og tveir ferðgáar settir upp fyri at tilskila, at koyrt verður inn í bygt øki. Vegurin gjøgnum Kollafjørð er tann landsvegurin, ið hevur næst mest ferðslu gjøgnum bygt øki.

Í Vági er eitt býarportur og ein ferðgái sett upp. Í Skálabotni eru tveir ferðgáar settir upp í 2009. Royndirnar við ferðgáum vísa, at miðalferðin minkar við 5 km/t, har ferðgáar eru.

## FERÐSLUTRYGDARÆTLANIR SAMAN VIÐ KOMMUNUM

Í Vága kommunu var ein ætlan fyri ferðslutrygdartiltøk í kommununi liðug í 2007. Í 2009 var ein rundkoyring og ymisk smærri ferðslutrygdartiltøk í Miðvági framd sambært hesi ætlan.

Í Runavíkar kommunu er ein ætlan fyri ferðslutrygdartiltøk byrjað í 2009. Talan er um eina samlaða ferðslutrygdarætlan fyri vegateinin ”Undir Gøtueiði-Mýravegur.”

FERÐSLUTRYGDARTILTØK 2009



## HEGNA FYRI SEYÐI

Hegnað er fyri seyði við Leitisvatn í Vágum. Seyðasmoga er gjørd undir vegin, og hegn er sett upp, so seyður ikki sleppur á vegin á hesum vegateini.



## TRYGGING AV VERANDI VEGUM

Á Viðareiðisvegnum er eitt 600 m langt vegastrekki breiðkað.

www.sansir.fo